# Ljósamorreyðir og ringmerktir ravnar

## Um ravnin

Í 2005 er føroyski búfuglastovunurin hjá ravni mettur til 500 pør sambært „Lista yvir fuglar, sum eru sædd-ir í Føroyum" (Jens-Kjeld Jensen, Dorete Bloch og Bergur Olsen). Í Fróðskaparriti 31. bók skriva Dorete Bloch og Søren Sørensen, at ravnar um heystið 1982 (21. sept.) flugu í ein landsynning til havs við Akraberg. Teir komu tó inn aftur og hildu norður við landinum eystanfyri. Hetta kundi møguliga verið ein ábending um, at ravnur ikki er so støðugur støðufuglur, sum altíð hevur verið hildið.

Einans 17 ravnar eru ringmerktir. Abraham Mikladal ringmerkti 11. mai 1993 tríggjar ungar á Tunnufjalli á Viðoynni. Ein teirra varð skotin í Havnardali 19. mai 1994.




Tekstur: Jens-Kjeld Jensen
*jkjensen@olivant.fo*

Myndir: Jens-Kjeld Jensen

Hans Eli Sivertsen
*hanseli@olivant.fo*

## Ljósamorreyður ravnur

Ein ljósamorreyður ravnur (1. mynd) varð skotin í november 2007 í Fugloy. Hann hevði ilt við at flúgva, og krákurnar eltu hann. Náttúrugripasavnið hevur nú ravnin útstappaðan.

Bjørn Patursson skrivar 9. okt. 2007 soleiðis á FaroeNature.net: Í dag, tá eg rak seyð suðuri á Kolturstanga fleyg ein hvítur (ikki snjóhvítur), men heldur gulhvítur fuglur upp úr eini kloyvu og helt leiðina suður gjøgnum sundið móti Hestoynni. Eg var vísur í, at tað var ein ravnur eftir flognum og skapinum at døma, men trúði ikki mínum egnu eygum. Hevði kikara við, men hann fleyg beint undan, so eg fekk ikki 100% staðfest, um so var.

Um ársskiftið 2007-2008 vóru fleiri leysasøgur um ein hvítan ravn í Norðradali. Dorete Bloch skrivaði 5. jan. 2008 á FaroeNature.net: Eg havi beint nú fingið at vita, at ein hvítur ravnur heldur til við gjónna í Fossdali norðan fyri Velbastað. Um hann er fullkomiliga sum ein hvítur ravnur, veit eg ikki enn. Enn er bert ein vánalig mynd av honum. Nógv sóu henda ljósa ravnin um miðjan marsmánað. Eg og Hans Eli sóu 17. mars henda ljósamorreyða ravnin oman fyri Velbastað (2. mynd).

Poul Johannus Simonsen sá 8. apríl 2008 í sambandi við nátafleyg ein hvítan ravn á Viðareiði.

Rodmund á Kelduni tók 15. apríl 2008 eina mynd av helst sama ravni í Sumba.

Elmar Sørensen sá 15. sept. 2008 saman við fleiri ein ljósan ravn á Viðareiði, og var hann í fylgi við 15-20 øðrum ravnum.
Ein ljósur ravnur var á Kirkju í januarmánaði 2009 sambært Jóhan Lydersen.
Eg havi síðan ongar frásagnir fingið um ljósar ravnar.

## Misliting

Hesir ravnar eru ikki litloysingar (*albino*), t.e. hvítir við reyðum eygum. Ei heldur eru teir svartir við hvítum fjaðrum eins og tann útdeyði „bringuhvíti ravnur".
Á heimasíðuni netfugl.dk hevur Knud N. Flensted skrivað ein samandrátt úr eini grein um mislittar fuglar eftir Hein van Grouw, ið stóð í Dutch Birding (vol 28: 79-89). Hann skrivar m.a., at eumelanin eru tey svørtu og morgráu litevnini, og phaeomelanin eru tey reyðbrúnu litevnini. Summi fuglasløg (t.d. lomvigi, álka, felliskráka, rókur, kráka, ravnur, sjógvhøna, másar) hava einans eumelanin. Flest fuglasløg hava bæði sløgini av melanin, men sum vitan er um, so hava eingi fuglasløg einans phaeomelanin.

Littynning (*dilution*) er ein tann vanligasta litúrbregðin (*mutatiónin*) hjá villum fuglum, og tann, sum oftast verður mistikin fyri fullkomna littynning (t.e. heilt hvítar fjaðrar, leucisma). Fuglur við littynning hevur litevni í fjaðrunum, men í minni nøgdum enn vanligt. Fjaðrarnar eru bleikar og blikna ofta enn meira av sólarljósinum. Vanliga er melaninnøgdin bert ein helvt, so littyntir fuglar eru ofta bleikir, t.e. ljósir í fjaðurbúnanum.

## Úrslit

Niðurstøðan av øllum hesum er tann, at her vóru í øllum førum tveir ljósamorreyðir ravnar í tíðarskeiðinum 2007-2009. Tann skotni ravnsungin í Havnardali í 1994 saman við teimum mongu eygleiðingunum av ljósamorreyðum ravnum vísa, at tann føroyski ravnurin strýkur um alt landið. V

### Les meira

H.J. van Grouv. 2006. *Not every White Bird is an Albino: sense and nonsense about colour aberrations in birds.* Dutch Birding 28: 79-89.

1



2



SUMMARY

# Dilutionistic ravens around the Faroe Islands

In the years 2007-2009 at least two dilutionistic ravens were seen around the islands. One of them was shot and is now stuffed and placed in the Natural Museum in Tórshavn. Of 17 ringed ravens one has been found, and it was a juvenile, which was ringed on Viðoy and shot one year later in Tórshavn. This one together with observations of the dilutionistic ravens are indecations that young ravens are flying a lot around the islands, and possibly some migrate southwards as observations from 1982 indicate.